KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-700 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Vegleiðing í at skriva eina útgreinaða frágreiðing um skúlabarn

Upplýsingar um barnið

- Navn, aldur, bústaður
- Navn og bústaður hjá foreldrunum
- Foreldramyndugleiki
- Hevur barnið onnur systkin

Stúranin um barnið

- Hvørjum stúrir tú fyri hjá barninum
- Hvat hava tit sæð, kannað ella skrivað. T.d. dagbók, samrøður, eygleiðingar o.a.
- Hví ørkymlan – hendingar, atferðarbroytingar,hendi hetta brádliga ella stigvíst
- Barnsins atburður, fyrr og nú
- Barnsins samskifti við onnur børn, vaksin, foreldur, systkin, starvsfólk ella onnur
- Hvussu ávirkar støðan hjá barninum familjuna
- Hvussu er samband tykkara við foreldrini
- Hvat hevur skúlin gjørt fyri at hjálpa barninum
- Hvørji tiltøk halda tit skulu til fyri at hjálpa barninum

Upplýsingar sum lýsa barnið og støðu tess:

Um familjuviðurskiftir

- Luttaka foreldrini á foreldrafundum
- Verður kontaktbók nýtt í sambandi við samskifti millum foreldur og skúla
- Stuðla foreldrini barninum
- Møta foreldrini upp, tá tey verða innkallað til foreldraviðtalur um so er, at trupulleikar eru við barninum.

Upplýsingar um barnið í skúlanum

- Hvørjum flokki gongur barnið í
- Fráverutíttleikin hjá barninum
- Hvussu leingi hevur skúlin kent barnið/familjuna
- Luttekur barnið í aktivitetum í og uttan fyri skúlan
- Hevur barnið matpakka við í skúla
- Luttekur barnið í fimleikið
- Hevur barnið skift skúla
- Hvussu er barnið fyri fakligt í t.d. rokning, lesing og skriving
- Hevur barnið vinir í flokkinum
- Luttekur barnið aktivt í undirvísingini
- Hvussu er sambandið millum barnið og lærarnar

Um tann sosiala atburðin hjá barninum í mun til onnur børn og í mun til tey vaksnu í skúlanum

- Spælir barnið við hini børnini
- Hvussu er atburðurin hjá barninum í flokshøpi
- Hvussu er sambandið við læraran.

Upplýsingar um flokkin

- Eru serlig viðurskifti í flokkinum sum heild
- Eru onnur børn í flokkinum, sum hava trupulleikar
- Er flokkurin lagdur saman við annan flokk

Um kropsligu og motorisku støðuna hjá barninum
T.d. um barnið vigar ov nógv og tykist darvað av hesum.

Um aktivitetir/lærugreinar, ið barninum dámar betur enn aðrar
Ger eina lýsing av gongdini. Um møguligt eisini fakligu áskoðanina.

Aðrir upplýsingar
Eru punktini omanfyri fylgd, átti tað longu nú at víst, um barnið hevur trupulleikar. Um ikki, lýs tað stutt og ítøkiligt.